## Matiné

verður í Havnar kirkju leygardagin 18. juli kl. 11.30. Tónleikur fyri klaver, sello og gittar. Jósef H. Olsen, sum júst hevur lokið lesna á Miðnám í musikkskúlanum spælir tónleik av Chopin og Bartok á klaver. Kristina á Váli spælir sellosuitu av J. S. Bach og Dávur Davidsen spælir tónleik av Bach og Cardassi á gittar. Eisini fara Jósef og Kristina at spæla onkur kend stykkir fyri cello og klaver.

## Trentemøller skrivar autografar

Áðrenn Trentemøller fer á pall við Múrin í dag, skrivar hann autografar á ungdómsdeild Eiks, har tiltak verður. Tiltakið byrjar klokkan 15 við vitjan av Trentemøller, sum skrivar autografar. Eisini verður tónleikur á altanini, har eitt nú Linda Andrews fer at syngja. Eisini luta tey burtur eitt backstage-pass, til at hitta Anna David. Kappingin og burturlutingin verða á staðnum. Aftaná ber til at ganga niðan í Gundadal, har bussar koyra beinleiðis til festivaløkið. Trentemøller hevur júst framført á Roskilde Festivalinum og fingið góð ummæli frá TV2 og Politiken.





*Tróndur Patursson er farin at arbeiða við fleiri øðrum litum*
*Mynd: Beinta Haraldsen*

# Tróndur við nýggjum litum

**Sunnudagin letur Tróndur Patursson upp listaframsýning á skipasmiðjuni í Havn, og hann sýnir fram bæði glaslist og málningar. Hann arbeiðir nú við fleiri nýggjum litum**

LIST
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur Tróndur Patursson ikki havt nakra listaframsýning í Føroyum, men nú er hann aftur við eini stórari framsýning.

Sunnudagin letur framsýning hansara upp á skipasmiðjuni í Havn, har fleiri listafólk hava arbeiðshøli.

- Hølini eru serstakiliga væl egna til mína framsýnøing, tí tey eru so stór, og tað ber til at fara langt frá listaverkunum, sigur




Tróndur Patursson.

Til framsýningian eru hølini býtt upp í fleiri rúm, tí ikki bar til at hava glasverkini í sma rúmi sum málningarnar. Hevði hann hongt glasverkini í vindeyguni, høvdu tey skuggað fyri teim stóru málninginum.

Eitt eyðkenni fyri verkini hjá Tróndi Paturssyni tey seinastu árini hevur verið tann blái liturin og tað bláa ljósið.

Bláu verkini hava fingið eitt rúm fyri seg, men glasverkini eru eisini í øðrum rúmum, við tað at Tróndur Patursson er farin at arbeiða meira við øðrum litum eisini.

### Sjáldsamur litur

Serliga fegin er hann um ein grønan lit, sum hann fann í einum handli í París fyri nógvum árum síðan. Í nøkur ár hevur hann leitað aftur eftir hesum litunum, og fyri ikki so langari tíð síðan fann hann henda avísa grøna litin aftur. Liturin er annars útgingin.

Hann arbeiðir annars við fleiri øðrum litum, sum gjørdir eru úr ymiskum tilfari.

Tróndur Patursson er ein sera virkin listamaður, sum hevur framsýningar í fleiri londum.

### Til Russlands

Í heyst fer hann til Hvítahavið, har byggast skal ein granskingarmiðstøð.Tróndur Patursson var fyri nøkrum árum síðan í Skt. Pætursborg og sýndi fram. Tá hevði hann gjørt ein hval, og nú er hann biðin um at gera ein hvítan hval til nýggju russisku granskingarmiðstøðina, tí hvalurin verður teirra búmerki.

Annars arbeiðir hann við at gera ein glasmálning til ein skúla í Danmark.

Framsýningin hjá Tróndi Paturssyni heldur fram til hálvan august.



*Feðgarnir Tróndur og Brandur Patursson eru báðir listamenn, og tá ið annasr skal heingja eina framsýning upp, hjálpir hin til*
*Mynd: Beinta Patursson*